# Avloysari fyri pedagog
## til dagstovnin í Fuglafirði

Til stovuna undir Hamri verður søkt eftir 1 pedagogi 40 tímar um vikuna at byrja 1. august 2003. Starvið er tíðaravmarkað frá 1. august til 31. desember 2003.

Starvið er á stovu við 12 børnum í aldrinum 0-3 ár.

Dagstovnurin er ætlaður 60 børnum og er stovnurin skipaður í tvey hús við eini barnagarðsstovu og eini vøggustovu í hvørjum húsi.

Lønin verður sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið. Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Juliannu Næs leiðara tlf. 225222/444940.

Um eingin pedagogur søkir starvið, kunnu hjálparfólk verða sett.

Umsóknir saman við avritum av prógvum og viðmælum skulu verða býráðsskrivstovuni í hendi í seinasta lagi 27. juni 2003. kl. 10.00.

Býráðið skilir sær rætt til at velja millum innkomnu umsóknirnar ella onga at taka.

Fuglafjørður, 11. juni 2003

**Fuglafjarðar býráð**

# Eysturoyingar
## Lastbilakoyrikort

Nýtt skeið til lastbil og buss byrjar uml. 15. juni í Eysturoynni

PS: Eisini nýtt skeið í Klaksvík 15. juni



**Klaksvíkar Koyriskúli**
**tel 77 77 77**

Sosialurin 341800

# Nýggjar TANNPROTESUR

**Broytingar og umvælingar av gomlum protesum**

Kliniskur tanntekniari
Bergur á Reynatrøð

Opið er:
mánadag-hósdag frá kl. 9-16
fríggjadag frá kl. 9-12

Børkuvegur
620 Runavík
Tlf. 448480

# Stuðulsfólk

**Almannastovan søkir við hesum eftir stuðulsfólki. Sum stuðul fær tú eitt sjálvstøðugt og fjølbroytt starv.**

***Í Eysturoy:***
At stuðla einum 5 ára gomlum barni. Tímatalið er 30 tímar um vikuna. Stuðulin hevur vanliga tilhaldsstað á dagstovni. Veitt verður eisini stuðlinum ráð- og vegleiðing. Játtanin er fyribils til 30.06.04.

Setanarviðurskiftini eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag í mun til uppgávuna.

Nærri fæst at vita við at venda sær til Dagbjørt Hjaltalin og Sigrun Bærentsen á telefon 353510, gerandisdagar millum kl. 09.00-13.00, tó ikki mikudag.

Umsóknir saman við upplýsingum um útbúgving, royndir og møguligum viðmælum, skulu verða

**Almannastovuni**
J. Broncksgøta 27
Postrúm 3096,
110 Tvøroyri,

í hendi í seinasta lagi 23.06.03.

## Tøkk

Til øll, ið vóru við í verkfallinum á ein og annan hátt. Tit, ið stuðlaðu bæði inni og úti, burturi og heima.

Verkfallvaktir og leiðarar, kokkar, bussførarar og annars øll, ið góvu eina hjálpandi hond undir verkfallinum, tey ið góvu skerpikjøt og annað gott.

Allir limir í feløgunum - takk fyri sera gott samanhald, uttan tykkara stuðul megnaðu vit ikki at vinna stríðið - samanhald gevur styrki.

Eisini ein tøkk til øll hini verkafeløgini, ið stuðlaðu undir verkfallinum, bæði við skrivum, lýsingum og peningaliga.

Eingin nevndur, men sanniliga eingin gloymdur.

Føroya Arbeiðarafelag
Havnar Arbeiðsmannafelag
Havnar Arbeiðskvinnufelag
Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag
Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag

Sosialurin 341800

# Gravsteinar, kantsteinar og blómubeð

**Nú eisini úr Føroyskum gróti**

Skjót levering



Prísir við litmyndum verða sendir kring landið og til útlandið

**Danstein** Tel. 447512 Tel. 217512 Tel. 318323 Fax 449961
www.danstein.fo
RUNAVÍK - R. C. EFFERSØESGØTA 19, TÓRSHAVN

Sosialurin - 311820



Nýtt skeið til motorsúkklukoyrikortið byrjar týsdagin 17. juni kl. 19.30

# Føroya Koyriskúli

v/ **John Christiansen**, koyrilærari
Suðuroyarvegur 11 • FO-100 Tórshavn • Tel 21 47 75

# Dagrøktari

Søkt verður eftir dagrøktara at ansa børnum, ið eru farin í skúla, at byrja 18.08.03

Umsøkjarin skal vera kreativur og hava hegni til starvið, ikki hava egin børn undir skúlaaldur, dáma væl at vera úti í náttúruni og fara ymsastaðni við børnunum í bussi.

Umsøkjarin skal hava góðar umstøður innandura.

Løn sambært sáttmála H.K og F.A.

Skrivlig umsókn verður at senda til:

**Dagrøktarskipanina í Hósvíkar Kommunu**
Rættarvegur 10
420 Hósvík

í seinasta lagi 27.06.2003.

# Dagrøktari

Søkt verður eftir dagrøktara at ansa børnum frá 0 til 2 ár, at byrja 18.08.2003.

Umsøkjarin skal vera vanur við børn og somuleiðis hava hegni og áhuga í at menna børnini í spæli og álvara, bæði innan- og uttandura.

**Krøv**
Tað er eitt krav, at umsøkjarin hevur góðar umstøður innandura og hevur girðing uttandura, so børnini kunnu spæla í tryggum umstøðum.

Løn sambært sáttmála H.K og F.A.

Skrivlig umsókn verður at senda til:

**Dagrøktarskipanina í Hósvíkar Kommunu**
Rættarvegur 10
420 Hósvík

í seinasta lagi 27.06.2003.



# Les lívfrøði í Føroyum

Nýggir studentar verða upptiknir á Náttúruvísindadeildini á Fróðskaparsetrinum í summar. Tá byrjar eitt nýtt hold á lív-/evnafrøðiligu støðisútbúgvingini, har lærugreinirnar í heyst verða hesar:

- Evnafrøði
- Ryggleys dýr
- Støddfrøði
- Plantubygnaður
- Teldunýtsla

Í summar byrjar eisini undirvísing á yvirbygninginum til BS-lívfrøði. Lærugreinirnar í heyst verða hesar:

- Havfrøði
- Havlívfrøði
- Jarðfrøði
- »Formidling«
- Fiskalívfrøði
- Almenn smálívfrøði

Tvey feltskeið verða eisini í summar:

- Vistfrøði á landi: 30. juni til 4. juli
- Vistfrøði í vatni: 25. til 30. august

Umsóknarblað fáast við at venda sær til Náttúruvísindadeildina ella av heimasíðuni www.setur.fo Upptøkutreyt til lív-/evnafrøðiligu støðisútbúgvingina er støddfrøðiligt studentsprógv við B-stigi í lærugreinunum evnafrøði, støddfrøði og alisfrøði. Fólk við øðrum tilsvarandi fortreytum kunnu verða tikin upp eftir nærri meting. Tað ber eisini til at melda seg til eina ella fleiri stakar lærugreinir.

Meir fæst at vita við at venda sær til Náttúruvísindadeildina, tel. 35 25 50, ella við at hyggja á heimasíðuna: www.setur.fo Umsóknir skulu stílast til: Náttúruvísindadeildin, Boks 2109, FO 165 Argir. Umsóknarfreistin er 1. juli 2003. Byrja verður 25. august 2003.

# Yvirlýsing
## Stuðul til Maskinmeistarafelagið

Undirritaðu fakfeløg lýsa við hesum okkara fulla stuðul til Maskinmeistarafelagið í stríði teirra móti Fiskiveiðieftirlitinum.

**Vit átala, at maskinmeistarar, sum søkja størvini sum maskinmeistarar hjá Fiskiveiðieftirlitinum, gera sær dælt av trætuni millum Maskinmeistarafelagið og Fiskiveiðieftirlitið.**

Hesir maskinmeistararar eru vælvitandi um, at talan er um ein ósemju millum arbeiðsgevarapartin og fakfelagið, og tí skilja vit als ikki, at teir við umsóknum sínum stinga fótonglar fyri teir maskinmeistarar, sum í royndunum at fáa loyst trætuna, hava sett størv síni uppá spæl.

Vónandi stendur øll føroyska fakfelagsrørslan saman móti slíkum ágangi og vit vilja staðiliga mæla maskinmeistarunum **frá** at søkja lýstu størvini, so leingi trætan millum felagið og Fiskiveiðieftirlitið ikki er loyst. So mikið av samanhaldi vóna vit, at hesir maskinmeistarar kenna mótvegis starvsfeløgum sínum.

At enda skulu vit staðiliga mæla Fiskiveiðieftirlitinum til at medvirka til, at málið verður loyst, við at verandi maskinmeistarar halda áfram í størvum sínum.

**Tórshavn, 12.06.2003**

Landsfelag Handverkaranna • Føroya Sjúkrarøktarfrøðingafelag
Føroya Handverkarafelag • Føroya Lærarafelag • Føroya Arbeiðarafelag

Sosialurin 341800

# Lærari til Kollafjarðar skúla

Søkt verður eftir lærara til tíðaravmarkað starv við Kollafjarðar skúla at undirvísa 26,5 tímar um vikuna skúlaárið 2003/2004 fyri lærara í farloyvi.

Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til skúlaleiðaran tel 421475 ella skúlastýrisformannin tel 421609.

Umsóknir við avriti av prógvum skulu vera skúlastýrinum í hendi í seinasta lagi á middegi leygardagin 28. juni 2003.

**Kollafjarðar skúlastýri**
v/ Dortheu Joensen
FO 416 Signabø



# Handilslærlingur

**Søkt verður eftir Handilslærlingi til VHS handilin á Hálsi.**

**Vit kunnu bjóða:**
Eitt spennandi starv til tann sum fær læruplássið, har viðkomandi sleppur at royna seg sum vørukeypari, gera tilboð og prýða um handilin. Viðkomandi fær eina breiða vitan um ventilatión, hitaanlegg og sanitet.

**Uppgávurnar fevna m.a. um:**
- Avgreiðlu av kundum
- Telefon avgreiðslu
- Røkt av handlinum
- Bílegging av vøru
- O.a. fyrifallandi arbeiði

**Førleikakrøv:**
At tann sum søkir hevur FHS ella HH

Send eina skrivliga umsókn til:

**P/F Maria Poulsen**
Smyrilsvegur 8
Postboks 182
100 Tórshavn

*P/F Maria Poulsen, er størsta HVS virkið í Føroyum, við handli, verkstaði og búnýti. Í dag starvast 35 fólk hjá fyritøkuni*

Meira fæst at vita við at ringja til Símin ella Áka á telefon 312000

**pf Maria Poulsen & Co.**
FO-100 Tórshavn • tel 312 000

Sosialurin 341800

**Kaj Andreasen & Co**
Heilsøla • smásøla • umboð
Tel. 31 56 00 • www.andreasen.fo

## Stilladsútgerð og forskallingsútgerð

HÜNNEBECK

**Til keyps og leigu:**

- Fasadustillads
- Rullustillads
- Aluminiumstillads
- Forskallingar - Nógv sløg!
- Forskallingsútgerð: Forskallingsoljur, sproytur, klams, konus, avstandsrør, binditráður, bindimaksinur, fuguband, stoypibats/isolering, armeringsjarn o.a.



Leverandørurin til byggi-entreprenørvinnuna síðan 1970!

Sosialurin 341800

www.sosialurin.fo